




# Tað besta vit hava

**Tað er ikki altíð lætt at taka dagar ímillum, tá tað besta skal veljast burturúr rúgvuni. Men tá tað besta innan nútíðar føroyskan tónleik skuldi brúkast til at sýna fram føroyska mentan á Norðurbryggjuni, hevur valið neyvan verið so torført. Tað besta vit hava eru Eivør og Teitur.**





BRYGGJAN

*Rúnar Reistrup*
*runar@sosialurin.fo*

Eg minnist meg bara einaferð fyrr hava upplivað tey bæði framført á sama tónleikatiltaki. Tað var í Norðurlandahúsinum summarið 2001 tá tey bæði fremstu nøvnini í nýggjari føroyskum tónleiki høvdu konsert í felag. Og tó at talan var um eina Eivørkonsert og eina Teiturkonsert hvør í sínum lagi, góvu tey bæði eisini áhoyrarunum ta frægd at syngja tvær duettir undir Teiturkonsertini. Løgini vóru føroyski klassikarin "Mær leingist" og lagið hjá Teitur "We still drink the same water", sum manglar á fløgu hansara.

Síðan 2001 eru bæði Teitur og Eivør komin nógv longri eftir hvør sínari tónleikaleið, men herfyri møttust hesar báðar leiðir aftur til somu konsert á føroysku framstøðuni í Keypmannahavn, Norðurbryggjuni. Bæði kundu upplivast á upplatingarfestivalinum saman við nøkrum av frægastu føroyingunum innan myndlist og konseptlist, soleiðis at Føroyar kundu vísa seg frá sínari bestu síðu.

### Sá gott út

Og besta síðan sá bara gott út hetta vikuskiftið á Bryggjuni. Teitur yvirtók pallin eftir sangaran Simon Lynge, grønlendska Teitur, kundi man freistast til at sagt, tó at evnaríki grønlendingurin ikki er nóg royndur til at nøkur samanbering er rættvísandi.

Eg hoyrdi Teitur á keypmannahavnska spælistaðnum Rust fáar dagar frammanundan. Tá var hann í sínum rætta umhvørvi á einum lítlum palli í einum myrkum rúmi, sitandi við kertuljósum rundan um seg. Tað kvøldið spældi hann seg inn undir húðina á áhoyrarunum.

Í stóra ljósa salinum á Norðurbryggjuni, har fólk gjøgnum alla framførsluna gingu út og inn úr salinum sum var tað ein jarnbreytarstøð, hevði Teitur tíverri ikki tann frið og tað fokus, sum krevst fyri at fáa kynstrið at rigga. Hann var góður, men fekk ikki gandað.

### Ein smakkiroynd

Eivør og hennara íslendski bólkur, sum hevur valt at taka navn eftir nýggju fløguni og nú kallar seg Krákan, liðu ikki so eins undir umstøðunum. Eivør dró fleiri fólk inn í salin enn Teitur, og tað tipti tíbetur fyri fólkastreyminum inn og út ígjøgnum hurðina.

Harafturat er tónleikurin hjá Eivør og bólki hennara meira ágangandi og harður og krevur soleiðis ans frá áhoyrarunum á ein heilt annan hátt enn tónleikurin hjá Teiti, sum verður noyddur at dúva uppá, at áhoyrararnir velja at geva honum ans.

Eivør og Krákan serveraðu nakrar perlur av pallinum, og so var liðugt, langt áðrenn áhoyrararnir vóru klárir at fara heim.

Fólk fingu eina smakkiroynd av Teiti og Eivør og ikki meira enn tað, meðan tey bæði framfarandi tónleikafyribrigdini fingu víst nakað av sær sjálvum fram sum umboð fyri Føroyar á hesum norðuraltantiska framsýningarstaðnum mitt í Keypmannahavn.

# Jim Reeves, Hans Jacob Højgaard og Elvis í Fríðrikskirkjuni

**Í morgin, sunnudagin kl 20, verður jólakonsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum**

KONSERT

Nú sunnukvøldið klokkan 20:00 verður konsert í Fríðrikskirkjuni undir leiðslu av Jóhan Mortensen.

Blandað kór við einum 35 sangarum fer at leggja fyri. Í ár er einki nýtt kórverk á skránni. Í staðin sleppa Hans Jacob Højgaard, Jim Reeves og Elvis Presley framat.

Kórleiðarin hevur tikið nøkur løg, sum Jim Reeves og Elvis Presley plagdu at syngja og sett tey út fyri kór.

Næmingar úr skúlanum á Glyvrum fara eisini at syngja. Saman við blandaða kórinum og tónleikarunum fara teir at framføra tvey løg.

Eftir stutta andakt og luciagongd fer eitt gentukór at syngja. Framhaldsdeildin í Runavík hevur nú í fleiri ár verið umboðað á jólakonsertunum í Fríðrikskirkjuni. Hesa ferð fer eitt gentukór, mannað við einum 40 gentum úr framheildsdeildini og

7. flokki, at hugna um við trimum løgum. Yndisliga lagið hjá Mozart »Ave verum« hevur verið á skránni á hvørjari konsert - og soleiðis er eisini í ár.

Inn ímillum sangframførslurnar fara næmingar úr Nes Sóknar Musikkskúla at spæla nøkur løg.



Blandaða kórið fer so at enda konsertina við nøkrum løgum.

Eins og í fjør eru sera góðir tónleikarar við í tiltakinum.

Konsertin verður sum sagt sunnukvøldið 14. des. klokkan 20:00.